## DAGSINS MEINING

# Fyrsta felagið skrásett

Í dag verður fyrsta føroyska felagið skrásett á føroyska virðisbrævamarknaðinum undir tí íslendska virðisbrævamarkaðinum.

Vit vilja hervið ynskja Atlantic Petroleum tillukku við merkisverda degnum, og verður tað spennandi at síggja, hvussu fer at hildnast hjá hesum felagi á virðisbrævamarknaðinum, sum fyrsta skrásetta føryska felag á virðisbrævamrknaði Føroya.

Tað verður spennandi at síggja, hvussu føroyingar fara at taka virðisbrævamarknaðin til sín. Íløgumentanin í Føroyum hevur í tí farna verið merkt av, at fólk sita á sínum partabrøvum, heldur enn at keypa og selja í stóran stíl. Seinnu árini hava t.d. Framtaksgrunnurin, Notio og Tryggingarfelagið merkt tær stóru partabrævatransaktiónirnar mangan við tilhoyrandi partaeigaraavtalum, so ikki kann sigast, at vanligi føroyingurin sum íleggjari hevur havt nógv incitament til at gera íløgur seinnu árini. Eitt undantak til hetta kann tó verða júst Atlantic Petroleum, ið nú verður skrásett á virðisbrævamarknaðinum. Hetta felag er nevniliga merkt av nógvum smáum partaeigarum fyriuttan teir stóru stovnarnar av felagnum.

Virðisbrævamarknaðurin kann síggjast sum eitt eksperiment, sum nú tíbetur verður útført við einum privatum felagi, heldur enn einum almennum. Verður útfallið gott, so kunnu vit føroyingar frøðast um tað, og Atlantic Petroleum fer í søguna sum eitt undangongufelag, hvat tað ivaleyst er undir øllum umstøðum.

Vit hava her á hesum stað verið skeptisk viðvíkjandi einum føroyskum virðisbrævamarknaði. Ein av orsøkunum er talið av transaktiónum, ið neyvan kann gerast serliga stórt, og eitt annað er, hvussu man fer at fáast við at ansa eftir insidara problematikkinum, har betri vitan enn marknaðurin, sokallað insidara vitan, kann verða grundarlag undir insidarahandlum. Eitt annað, ið kann tykjast ivasamt er, hvørt tað er snilt at knýta seg uppí tann íslendska marknaðin. Tað er eingin loyna, at íslendski búskapurin er ekspanderaður nógv seinnu árini, og at lántøkan hevur verið ovurhonds stór, soleiðis at samlað uttanlanda skuldin pr íbúgva í Íslandi er hægr enn hon nakrantíð hevur verið í Føroyum. Hvussu vard eru vit, um Íslendski búskapurin fær eitt bakkast? Kann hetta ávirka føroysku feløgini, ið verða skrásett undir íslendska partabrævamarknaðinum? Finnbogi Ísakson hevði fyri ikki so langari tíð síðani eina grein um íslendska búskapin í Tinghelluni, og gav henda greinin nógv at hugsa um.

Hvussu er og ikki, so vil ein virðisbrævamarkanður gera, at føroyingar fara at fylgja betur við vinnuni og kanska eisini íslendska búskapinum. Sigurð Poulsen stjóri á Virðisbrævamarknaði Føroya roknaði við, at virðisbrævamarknaðurin fer at gera, at fjølmiðlar fara at fokusera meir á vinnumál. Vit ætla so ikki at lata okkara part liggja eftir, og tí hava vit eisini byrjað vinnusíður í blaðnum og vilja gera meir burturúr hesum í framtíðini.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# 3. Bert Ísraelfólk fingu Móselóg - ikki føroyingar

**Ebbedinna Jacobsen,**
*Kollafirði*



Tað er ein stór misskiljing tá ið summi fólk halda at vit skulu halda Móselóg og boðini, um vit skulu vinna tokka hjá Gudi. Hesi skriftorðini vísa okkum, at bert Ísrael fekk Móselóg:

"Harrin hevur útvalt sær Jákup, **Ísrael** til ogn sína." (Sálmi 135,4)

"Harrin hevur kunngjørt Jákupi (Ísrael) orð sítt, **Ísrael** boð Síni og lógir sínar; tað hevur hann ikki gjørt við nakra aðra tjóð; lógir Hansara kenna tær ikki". (Sálmi 147)

Bert **Ísrael** fekk Móselóg. Heldur ikki fekk nøkur onnur tjóð uttan Ísrael tey tíggju boðini, heldur ikki føroyingar. Tað er ivasamt um føroyingar vóru til tá. Við hesum verður ikki sagt, at innihaldið í Móselóg ikki er gott. Demokratisku rættarsamfeløgini í europa og serstakliga í norðurlondum, eru í høvuðsheitum bygd á meginreglurnar í teim tíggju boðunum og Móselóg. Men frá ævigari glatan frelsa hesar meginreglur ikki.

Fólk í onkrum trúarbólki halda seg dýrka Gud við at halda lógboð, sum Gud, við Jesusi Kristi, hevur tikið burtur fyri 2000 árum síðani.

### Kristus er endi lógarinnar

Nú meiri enn 2000 ár eftir, at Jesu fullgjørdi alt, tá ið hann doyði, sum lógin kravdi av okkum, so halda mong menniskju framvegis, at tey dýrka Gud við at halda **Móselóg**. Paulus, sum sjálvur var lóglærdur jødi, men varð frelstur við trúgv á Jesus Kristus, sigur við sigursælari visssu og sannføring:

"Kristus er **endi** lógarinnar, hvørjum tí til rættvísi, sum trýr." (Rómbrævið 10,4)

Kristus tók burtur boðlógina og **alt** sum hoyrdi til lógina. So fræls eiga vit at kenna okkum. Er hetta ikki stórt og vælsignað?

### Kristus gjørdi tað einsamallur

Einki menniskja hjálpti til við at útvega okkum frið við Gud, tí menniskjað kann einki gera her. Kristus gjørdi alt **einsamallur**.

"Hann (Kristus) kom og kunngjørdi tykkum frið, sum langt burtur vóru, og teimum frið, sum nær vóru. Tí við Honum hava vit - báðir partar - í einum Anda atgongd til Faðirin. Tí eru tit ikki longur fremmand og útlendingar; nei, tit eru samborgarar hinna heilagra og húsfólk Guds, tit, sum uppbygd eru á grundvølli ápostlanna og profetanna - og hornsteinurin er Kristus Jesus sjálvur. Í Honum verður allur bygningurin samanbundin og veksur til heilagt tempul í Harranum. Í Honum verða eisini tit bygd upp við hinum til bústað Guds í Andanum." (Efesusbrævið 2,17-22)

### Kristus útinti alt verkið á Golgatá

Hetta gjørdi frelsarin á krossinum fyri meiri enn 2000 árum síðani. Men **blind** eru menniskju, tá tey trúgva at tey dýrka Gud og verða frelst við at halda Móselógina, sum ongantíð er givin øðrum enn jødunum.

**Jesus** útinti verkið einsamallur, meðan hann hekk har í svárari pínu og stríddist samstundis við helvitis maktir, til hann rópti: "Tað er fullgjørt!". Signaður veri hann! Hann eigur alla tøkk og alla æru frá øllum Guds børnum gjøgnum alla ævina!

# Eingin roykur – eingin grind

**Martin Kúrberg**

Eg kundi hugsað mær at spurt Fyribyrgingarráðið um tey ikki síggja rúsdrekka og rúsevnistrupulleikan í hesum landi fyri berum royki, ella tey hava givið upp at røkja tann partin av sínum virksemi, sum eitur upplýsing um vandan av rúsdrekka og rúsevnismisnýtslu. Grundin til at eg spyrji um hetta er at Fyribyrgingarráðið nokk er tað einasta amboðið, sum fær eina líkinda játtan frá landinum til hetta arbeiðið og sýnist tað sum pengarnir fara upp í royk. Alt gott um bylgjuna, sum gongur ímóti royking um allan heim. Hon hevur vind í seglunum og nokk er tað nemmasta hjá Fyribyrgingarráðnum at dansa við hesum trendi. Men tað eru bólkar í samfelagnum so sum foreldur, makar, børn og onnur, sum liva hvønn dag við sviðanum av at onkur av teirra kæru kom út í misnýtslu. Og hvat við ungdóminum? Jú, har verður eitt arbeiði gjørt av felagsskapum, men tað verður alla tíðina merkt av nøkrum, sum alla tíðina verður brúkt í hesum landi í dag sum ein undanførsla: Manglandi játtan á økinum. Hyggið at sindraðum familjum. Hyggið at mynstrinum hjá misnýtarum, teir verða yngri og yngri. Hyggið at innleggingum á Landssjúkrahúsinum og á viðgerðarstovum, tær verða fleiri og fleiri. Og tað stendur ikki Prince, men neyð og elendigheit av rúsdrekka og rúsevnum á rygginum á hesum brotnu menniskjum. Og tá so tann sunni lívsstílurin veruliga skal í fokus, so síggja vit Pál Weihe og Hans P. Strøm í joggingdrakt við einum súrepli í hondini í »Degi og viku«. Eg vil bert minna tykkum á, at hóast tann bólkurin, eg her havi nevnt, kann vera tungur at fáast við, so eru tað hóast alt nøkur, sum trúgva upp á at tað hjálpir at upplýsa um vandan við rúsdrekka og rúsevnistrupulleikum. Tit eiga eisini at gera tykkara skyldu yvir fyri hesum bólki.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.